# Jólaoratorium J. S.Bachs í Gøtu Kirkju og í Nor›urlandahúsinum seinasta vikuskifti ›



TÓNLEIKUR

*Ólavur Hátún*

Kring allan heim hava stórfingnar tónleikaframførslur veri› í sambandi vi›, at í ár eru 250 ár li›in, sí›an tónaskaldi› Johann Sebastian Bach anda›ist. Eisini her í Føroyum hava slíkar merkiskonsertir veri›, og seinasta vikuskifti› var høvi til at hoyra ta› tónaverki›, sum um hetta mundi› man vera á skránni hjá flestøllum framkomnum kirkju- og oratoriikórum ví›a hvar: Jólaoratorii› hjá J.S.Bach.

Ta› var Havnarkóri›, sum saman vi› føroyskum og íslendskum solistum og vi› tónleikarum úr Føroyum, Íslandi og Danmark framførdi hetta megnarverk leygardagin í Gøtu Kirkju og sunnudagin í Nor›urlandahúsinum. Dirigentur var Jón Stefánsson, ivaleyst fremsti Bach-tulkari í Íslandi í dag, sum eisini føroysk kórfólk kenna væl frá kórstevnum her og kórvitjanum hendavegin.

Ta› kann tykjast løgi›, at ein, sum sjálvur var vi› í framførsluni, fer at umtala konsertina aftaná; men tá nú bla›stjórin á Sosialinum vísir okkum tann áhuga, at hann bi›ur um vi›merkingar, skal eg ikki bera meg undan.

Ta› var í 1734, at Bach setti sær fyri at skriva oratoriir til ársins stóru kirkjuhátí›ir. Av hesum ber Jólaoratorii› av í sínum stórlæti og vi› sínum fagna›ardámi. Millum tónaskøld man J.S. Bach vera ein tann fjøllbroyttasti, sum megna›i at skapa dygdartónleik á øllum tátí›ar tónaøkjum, ta› veri sær kirkjuligt ella ver›sligt, og í sínum skapanarvirki bæ›i fylgdi sló›a›um gøtum og vísti vegin langt fram í tí›ina.

Júst fyri nevnda tí›arbil hev›i hann skriva› og framført fleiri stásisligar kantatur til ymisk hátí›arhøvi heima hjá kurf‡rstanum í Sachsen, eins og hann eisini hev›i skriva› slíkan hei›urstónleik eitt nú til kongshúsi› í Póllandi. Hesi avrik komu eisini at seta dám á hansara kirkjuligu tónleikaskapan, og ikki minst í tí at taka úrvald brot burtur úr á›ur skriva›um tónleiki og fella tey inn í n‡skriva›an tónleik s‡ndi Bach sítt meistarliga kynstur. Men yvir øllum, sum Bach, hin fimti evangelisturin sum hann ver›ur nevndur, festi á bla›, hvíldi merkisor›ingin “soli Deo gloria”, “Harranum eina hei›urin”, og ta› var tí ongin andsøgn í tí, at hann solei›is burtur úr ver›sligum fagna›artónleiki førdi partar yvir í tónaverk, sum bóru móti tí himmalska.

Jólaoratorii› er ikki eitt heildarverk so sum t.d. Mattheuspassiónin ella H-moll Messan, men er sett saman av seks kantatum at framføra fyrsta, annan og tri›ja jóladag, sunnudagin millum jól og n‡ggjár, n‡ggjársdag og trettandadag, sum í gamlar dagar var halgidagur.

Oratoriiteksturin er jólaevangelii›, og rein og einfald ljó›a hesi bíbliuor› gjøgnum alt verki›. Men stø›ugt skiftir tónabúnin alt eftir innihaldinum. Máttmiklir eru tuttisatsirnir vi› ljómandi kórsangi og fullsettum orkestri, har ikki minst trompetirnar og slagverki› seta dám á, tá i› n‡føddi kongssonurin ver›ur fagna›ur. Varliga stu›lar continuospæli› - cello og cembalo - upp undir frásøgnina hjá evangelistinum, blídliga rura helst strúkarar Jesusbarni› í blund, floytur og oboir fylgja hir›unum á markini, og bæ›i inniliga og fulltónandi fylgir kirkjuli›i› vi› í frásøgnini um jólaundri› fyri nú júst 2000 árum sí›an og tekur trúarjáttandi til or›a í koralunum, sálmaørindunum, inní millum.

Upprunaliga framførsluætlanin vi› einari kantatu framførdari í sambandi vi› gudstænastuna á›urnevndu seks halgidagar ver›ur mangasta›ni hildin enn, eitt nú í Langholtskirkju í Reykjavík, har Jón Stefánsson er kantor; men meira vanligt er í einari konsertframførslu at halda seg til teir tríggjar jóladagspartarnar og so kanska at skoyta uppí onkran satsin úr seinni kantatum, so sum ta› eisini var› gjørt hesafer›.

Bi›in um vi›merkingar kann eg, nú eg ikki sjálvur hev›i lei›andi leiklut, geva mína sannføring til kennar, at vit hava alla orsøk til at vera gla› um og nøgd vi› framførslurnar seinasta vikuskifti›. Gle›iligt var ta› at kunna sta›festa, at Elsa Súsanna Dalsgaard stø›ugt mennist sum professionellur sangara. Berghild Poulsen, sum so hugtakandi greiddi sín romantiska solopart í Brahms Requiem seinasta summar, vísti til fulnar, at hon eins væl megnar at finna seg til rættis í barokka tónaheiminum hjá J.S. Bach, og í glæmum sluppu vit aftur at hoyra bjørtu og klokkureinu sopranrøddina hjá Sannu í Brekkunum. Fjálg og mergja› var bassrøddin hjá Bergflóri Pálsson, og tenorurin florbjörn Rúnarsson var so framúrskarandi, at honum munnu standa allar dyr opnar sum evangelistur í oratoriiframførslum bæ›i burturi og heima. Væl hev›i Jón eftir hesum fáu venjingum fingi› samansjó›a› orkestri› vi› tónleikarum so ymsasta›ni frá. Uttan at vilja taka naka› frá nøkrum í hesum gó›a tónleikarabólki loyvi eg mær serliga at nevna konsertmeistaran Sámal Petersen og 1. trompetistin Ken Jones.

Jón Stefánsson er ímyndin av einum kór- og orkesturlei›ara, tá i› hann er bestur. Hann er sannførandi í sínari tónleikafatan, er grei›ur og dynamiskur í sínari lei›slu, og haraftrat er hann so vinsælur í sínari arbei›sframfer›. Undir hansara hondum royndist Havnarkóri› sum rættiligt oratoriikór, i› saman vi› solistum, tónleikarum og dirigenti gjørdi hesar framførslur so ríkandi fyri bæ›i fremjandi og lurtandi, at tú kundi ynskt, at enn fleiri høvdu fingi› lut í hesari tónleikaupplivingi. Ein sjónvarpsupptøka í teirri glæsiligu og føgru Gøtu Kirkju hev›i uttan iva frøtt manga mannasál úti um landi› um jólini, og hvørjum líkist ta›, at útvarpi› ikki setir upptøkutólini í gongd, tá slíkt tiltak fer av bakkastokki í grannahúsinum í Sortudíki?











# Sørvágs kommuna væl fyri

**Ta› er stór kommunal uppgáva at fyrireika seg til fast samband um Vestmannasund, sigur Eivind Jacobsen, n‡valdur forma›ur í Sørvágs kommunu**

KOMMUNUVALI‹

*Ólavur í Beiti*

**Sørvágur:** Mánakvøldi› klokkan 18.30 hev›i n‡valda bygdarrá›i› í Sørvági valt n‡ggjan formann og næstformann. Forma›ur eftir 1. januar ver›ur Eivind Jacobsen og næstforma›ur ver›ur Erik Davidsen.

Tær ymisku nevndirnar eru ikki settar enn, men Eivind Jacobsen roknar vi›, at tær ver›a skipa›ar seinni í vikuni ella fyrst í komandi viku.

## Skuldin 15,3 mió

Spurdur, um n‡valdi forma›urin hevur stórar ætlanir í n‡ggja embætinum, sigur Eivind Jacobsen, at ta› arbei›i› í kommununi, sum hevur veri› gjørt higartil ver›ur at halda fram.

– Kommunan er væl fyri nú og kann sigast at vera komin úr kreppuni. Í 1992 skylda›i kommunan 40 mió krónur, og nú er skuldin 15,3 mió krónur, so ta› hevur gingi› tann rætta vegin, sigur Eivind Jacobsen.

Men ta› liggja stórar avbjó›ingar fyri framman, og ikki minst nú tunnilin um Vestmannasund skjótt ver›ur tikin í n‡tslu. Og til hetta sigur Eivind Jacobsen, at hann metir ta› sum eina stóra kommunala uppgávu at fyrireika seg til fasta sambandi› um Vestmannasund, ikki minst á tí vinnuliga økinum.

Í hesum høpi leggur Eivind Jacobsen eisini dent á, at tann trupulleiki skal ikki ver›a, at eingi grundstykki ver›a at fáa í Sørvági, tá i› fast samband ver›ur.



*N‡ggja bygdará›i› í Sørvági: (frá vinstru) Jákup Suni Lauritsen, Kristian Olsen, Berg Rasmussen, Erik Davidsen, Sólvá Thomasen, Eivind Jacobsen og Herálvur Jacobsen. Eivind Jacobsen er valdur forma›ur frá 1. januar 2001 og Erik Davidsen næstforma›ur.*

*Mynd: Ólavur í Beiti*

# N‡ggi frisørskúlin



*Lærlingur klippir lærumeistara. Marin Johannessen vi› saksinum er fyrsti lærlingur á n‡ggja hárfrí›kanarskúlanum, og hon heldur, at ta› er ein stórur fyrimunur, at lærutí›in bara er tvey ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tann Føroyski Hárfrí›kanarskúlin hevur nú tríggjar mána›ir á baki, og lei›arin fyri skúlan, Oddvør Jacobsen, er væl nøgd higartil. Endamáli› vi› skúlanum er at stytta lærutí›ina, har lærlingar sleppa undan óney›ugum lærugreinum og “spilltí›”, sum tiki› ver›ur til.**

HÁRFRÍ‹KANARSKÚLI

*Stefan í Skorini*

Ta› ber til at læra til hárfrí›kara uppá tvey ár ísta›in fyri f‡ra, sum vanliga útbúgvingin tekur nú.

Henda møguleikan gevur n‡ggi hárfrí›kanarskúlin hjá Oddvør Jacobsen. Hon hevur lagt seg eftir at geva ungum fólki tann møguleikan, tí hon metir, at vanliga útbúgvingin tekur óney›uga langa tí›.

– Ta› er ikki ney›ugt vi› eini 4-ára útbúgving til at gerast hárfrí›kari. Í hesi útbúgvingini sleppa lærlingarnir undan at vaska hár og sópa gólv í eitt ár, men fara beinanvegin undir at klippa.

– Á okkara skúla hava vit valt at sleppa nøkrum av teimum lærugreinunum, sum lærlingurin ikki ikki fær brúk fyri á hárfrí›kanarstovuni. Undirvísingin er annars tann sama í hinum lærugreinunum, sigur Oddvør Jacobsen.

Undirvíst ver›ur ikki í virkisbúskapi, samfelagsfrø›i, hú›- og andlitsvi›ger› og vallærugreinum. Vanligir lærlingar, sum fara á Tekniska skúla at hava hesar lærugreinar, skulu sita á skúlabeinki í eini 500 tímar.

– Dentur ver›ur lagdur á at hava lærugreinar, sum hava beinlei›is samband vi› sjálvt arbei›i› sum hárfrí›kari, sigur Oddvør.

– Ta› er bara í Føroyum og Danmark, at ta› tekur f‡ra ár at læra til hárfrí›kara, og ta› er ov lang tí› hjá ungum fólki. Í Noregi tekur ta› bara tvey ár.

## Ikki gó›tikin útbúgving

Undirvísingar- og Mentamálast‡ri› gó›tekur ikki útbúgvingina, tí má skúlin klára seg uttan stu›ul ha›ani, men ta› vænta›i Oddvør frammanundan.

– Slíkar útbúgvingar finnast í øllum ø›rum londum kring okkum, og eg havi havt ætlanir um at fara undir ein slíkan skúla fleiri fer›ir, sigur Oddvør.

Í Danmark kom fyrsti skúlin av hesum slag 1. maj í ár, og nú eru tríggir slíkir skúlar ni›ri. Í Danmark tekur útbúgvingin eitt ár, men í Føroyum er tí›in sett til tvey ár.

– Ta› er eingin ivi um, at hetta er framtí›in innan hárfrí›kanaryrki, tí ta› eigur ikki at taka so langa tí› at gerast hárfrí›kari.

– Ta› loysir seg eisini betur hjá lærlingunum, tí vi› hesum fært tú fulla løn tvey ár longri.

Oddvør metir ikki, at ta› ver›ur nakar trupulleiki hjá teimum, sum ver›a útlærd hjá henni, at fáa arbei›i eftur lokna útbúgving.

– Um ein dugir kynstri› at klippa, so er eingin for›ing fyri at fáa arbei›i sum hárfrí›kari.

## Skjótari er betri

Tann Føroyski Hárfrí›kanarskúlin hevur í løtuni tveir lærlingar. Annar er 23 ára gamla Marin Johannessen úr Havn, sum eigur tvey børn, og hon helt tí, at ta› var betri at taka læra til hárfrí›kara uppá tvey ár ísta›infyri f‡ra.

– Ta› er skjótari hjá mær at sleppa ígjøgnum hesa útbúgvingina, og hon hóskar betur til mín. Ta› er torført at sleppa inn a›rasta›ni vi› tveimum børnum, og eg helt, at hetta er minst líka gott, sigur Marin.

Marin heldur, at einasti munur millum hana og a›rar lærlingar er, at teir fáa eitt sveinaprógv.

– Ta› t‡dningarmiklasta er, at man dugir at klippa, tá lærutí›in er av.

Lærlingarnir skulu hava minst f‡ra model um dagin, sum tey kunnu venja seg á, men ta› er eingin trupulleiki hjá Marin at fáa tey til vega, tí hon hevur havt plakatir hangandi runt í b‡num um at fáa model. At byrja vi› klipti hon modellunum fyri einki, men nú tekur hon hálvan prís.